# Dømi um próvtøkuspurningar

## Dømi 1

### Djóra- og plantulæra

Les tekstin í fylgiskjalinum og hygg at myndunum og modellinum.

- Greið frá, hvat ein vistskipan er.
- Gev dømi um eina vistskipan, t.d. í haganum.
- Vís/ger eina vistskipan við myndum, modellum ella við at tekna.
- Hvat kunnu vit brúka vitanina um vistskipanir til?

Dømi um fylgiskjøl:

- Tekstur um vistskipanir
- Myndir av djórum í haganum ella vatnringrásini
- Modell úr lívfrøðistovuni, t.d. ein hara, niðurbrótarar ella egg.

## Dømi 2

### Kyknan

Les tekstin í fylgiskjalinum og hygg at myndunum og modellinum.

- Greið frá, hvat arvalæra er.
- Gev dømi um serføroyskar sjúkur.
- Vís arvagongdir við einum modelli ella ger eina tekning.
- Til hvat og hvussu kunnu vit brúka gransking á økinum?

Dømi um fylgiskjøl:

- Tekstur um arvalæru
- Útprintað heimasíða og/ella grein um serføroyskar sjúkur
- Myndir og modell av ymsum arvagongdum.

## Dømi 3

**Kroppurin**

Les tekstin í fylgiskjalinum og hygg at myndini.

- Greið frá rúsdrekka
- Gev dømi um, hvussu rúsdrekka ávirkar kroppin.
- Ger eina uppseting við framleiðslu av alkoholi.
- Vita tey ungu nokk um alkohol? Grundgev fyri svarinum (tað er ikki nokk bara at siga ja ella nei).

Dømi um fylgiskjøl:

- Tekstur um rúsdrekka
- Mynd/grein um avleiðingar av rúsdrekka
- Tól og útgerð til at framleiða alkohol.